# – Berið ikki ótta fyri oljuni

**– takið tvørturímóti ímóti henni við opnum ørmum og fáið tað besta burtur úr sigur Kjell Ursin Smith, stjóri fyri risastóru oljumessuna ONS í Stavanger, har fleiri enn 10 føroyskar fyritøkur luttaka í hesum døgum**



ALTJÓÐA OLJUMESSA
*Jan Müller úr Stavanger*

Hóast ongin vissa er fyri nøkrum lønandi oljufundi við Føroyar enn, so heldur stjórin fyri ONS, altjóða oljumessuna í Stavanger, Kjell Ursin Smith kortini, at føroyingar ikki eiga at missa mótið. Við hesum minnist hann fyrstu boringina í norskum sjógvi, har tað skuldu 33 til, áðrenn nakað lønandi fund varð gjørt.

Kjell Ursin Smith, sum sjálvur hevur drúgvar royndir í norskari oljuvinnu, vitjaði í Føroyum í fjør saman við eini sendinevnd úr Stavanger við borgarstjóranum á odda. Endamálið við vitjanini var m.a. at markanaðarføra norskar oljufyritøkur og vørur teirra í Føroyum, nú fyrstu boringarnar skuldu í gongd her. Uppgávan hjá Ursin Smith varð so eisini at fáa føroyskar fyritøkur við á oljumessuna í ár.

Hóast luttøkan hesaferð er minni enn undanfarin ár, so heldur hann kortini, at tær fyritøkurnar, sum eru við, hava møguleika at fáa nógv burtur úr. Hann hugsar ikki minst um tað samskifti og samstarv tær kunnu fáa við tær meira enn 1000 oljuvinnufyritøkurnar, sum eru við á messuni.

– Her finnur tú flestu av heimsins oljufeløgum og tænastufyritøkum í hesi vinnu, og vit halda tí ONS vera ein frálíkan karm fyri føroyskar fyritøkur at hitta umboð fyri aljóða oljuvinnuna.

Hetta er fyrst og fremst ein møtistaður, tvs. eitt pláss har tú kanst hitta umboð fyri øll hugsandi feløg í oljuvinnuni og her kanst tú eisini gera góð innkeyp umframt at sleppa av við tínar egnu vørur.

ONS stjórin heldur, at henda stevnan er eitt frálíkt høvi hjá eitt nú føroyskum fyritøkum at gera vart við seg, at vísa, hvørjar tær eru og standa fyri. Vanliga luttaka umleið 20 tjóðir úr øllum heiminum á stevnuni. Hesaferð luttaka Føroyar við umleið 10 fyritøkum, sum er munandi minni enn undanfarin ár. Hetta kemur av, at Føroyar eru í eini »bíðistøðu« í løtuni, nú tað framvegis er óvist, um olja finst í undirgrundini.

Kjell Ursin Smith ivast ikki í, at olja verður funnin við Føroyar og vísir til tey mongu fundini, sum eru gjørt í grannalangum. Hann sigur, at nú so stórur áhugi er fyri føroyska økinum, hava fyrireikararnir av framsýningini latið Føroyum eitt tað besta plássið, nevniliga nær við høvuðsinngongdina við síðuna av Statoil og Norsk Hydro. Eisini stórar kontraktorfyritøkur í oljuvinnuni sum Schlumberger og Baker Hugh liggja í sama umhvørvi. Eisini norska oljudirektoratið liggur í hesum økinum, tvs. at nógv vitjandi fara at koma framvið føroyska básinum.

Men hvør er so hesin norðmaðurin! Hann hevur verið marknaðarstjóri í Kværner í 12 ár, stjóri fyri Kværner í Bretlandi í 4 ár. Undan tí var hann statssekreterur í kommunalarbeiðsdepartementinum í stjórnini hjá Willokk. Hann hevur eisini verið býráðslimur í Stavanger.

Sjálvur byrjaði hann í oljuvinnuni við at gera eitt projekt um samfelagsligu árinini av oljuvirkseminum í Stavanger í 1975. Hann var við í tí fyrsta arbeiðsbólkinum, sum gjørdi eina konsekvensanalysu av oljuvirkseminum í Noregi. Hetta var eftir at olja varð staðfest. So hetta er nakað, sum hann framvegis hevur stóran áhuga fyri og tí roynir hann eisini at fylgja tí orðaskifti, sum er í Føroyum, nú undan eini møguligari oljuvinnu.



*Kjell Ursin Smith, stjóri fyri oljumessuna ONS í Stavanger vitjaði fyri eini tíð síðani í Føroyum fyri at skapa áhuga hjá føroyskum fyritøkum fyri at luttaka á framsýningini*

Kjell Ursin Smith skilur væl, at føroyingar seta spurnartekin við eina komandi oljuvinnu, nú talan er um eitt lítið og viðkvæmt samfelag.

### Dugað væl

Eftir eina vitjan í Føroyum í fjør heldur hann, at føroyskir myndugleikar hava dugað sera væl at taka hædd fyri útviklinginum og her ikki minst læra av tí, sum er hent í øðrum londum. – Tit eru nógv meira bevíst um støðuna, enn vit vóru fyri 25-30 árum síðani. Eg eri tí sera ovfarin og hugtikin av tí áhuga og innliti, sum føroyskir politikarar og her ikki minst løgmaður og oljumálaráðharrin hava. So føroyingar eru betri fyrireikaðir at taka ímóti eini oljuvinnu enn norðmenn vóru tað á sinni.

Hann heldur tað er sera umráðandi at fara væl um egna mentan og virði, nú ein stór nýggj altjóða vinna bankar uppá dyrnar. Hann heldur eisini, at føroyingar eiga at vera sera varnir at brúka oljuinntøkurnar men heldur koyra tær í grunn eftir norskum ella alaskamodelli.

Hann viðgongur, at norðmenn vóru ov seinir við at staðfesta tørvin á íbúðum til oljufólkini og heldur hetta er nakað, sum føroyingar eiga at taka í størsta álvara. Eiga at seta øki av og at syrgja fyri, at fólk, sum koma uttanífrá, búgva her.

– Tað vóru mong, sum søgdu, at útlendingarnir, sum komu til Stavanger, vildu oyðileggja okkara samfelag. Tað, sum hendi, var beint øvugt, at hesi fólkini hava ríkað okkara samfelag, og at vit við hesi vinnu hava fingið møguleikar sum ongantíð áður.

Sjálvur gjørdi hann eina samanbering í 1975 millum Stavanger, sum var við at byggja eina oljuvinnu upp – og so Esbjerg, har eingin olja var, og har úrslitið varð, at tey í Stavanger høvdu tað nógv betri sosialt, við ongum arbeiðsloysi osfr.

*– Men hevur oljan verið góð fyri Stavanger?*

-– Tað vil eg svara »ubetingat ja på«. Hann ivast onga løtu í, at oljan hevur havt ómetaliga positiva ávirkan á Stavanger og fólkið har.

*– Men hvussu við teimum negativu síðunum av oljuvinnuni?*

– Vit royndu at kanna um tað t.d. var størri alkoholnýtsla í Stavanger enn í øðrum norskum býum eftir at oljan hevði gjørt innrás og vísti tað seg, at tað var tað ikki. Kannaðu eisini um tað vóru fleiri sálarligar sjúkur her enn aðrastaðni, men tað vóru tað heldur ikki. So vit kunnu bara siga, at oljan í stóran mun hevur verið sera góð fyri býin.

Hann heldur eisini útlendsk oljufólk hava nakað at geva norskari mentan. Oljupengarnir hava eisini gjørt, at gomul virði eitt nú bygningar oa. eru komin til sín rætt aftur og eru við til at gera býin ríkari og betri.

So føroyingar eiga ikki at bera ótta fyri eini komandi oljuvinnu, um man tryggjar seg í góðari tíð við at hugsa um slíkt sum íbúðir og barnagarðspláss og eina skilagóða plasering av oljuinntøkunum.

Hann vónar at síggja nógvar føroyingar á oljumessuni og ynskir Føroyum góða eydnu við komandi leiting.



*Annaðhvørt ár er oljumessa í Stavanger og Aberdeen, har føroyskar fyritøkur hava verið væl umboðaðar seinastu árini. Myndirnar eru frá føroyska básinum í Stavanger fyrraárið, har Harald kongur vitjaði og hitti eitt nú Poul Mohr, stjóra og Eyðun Elttør, landsstýrismann*



# Elttør hittir bretska starvsbróðurin



*Tá Eyðun Elttør, landsstýrismaður hitti bretska starvsbróðurin John Battle á oljumessuni í Stavanger fyri nøkrum árum síðani og har var við at fáa glið á aftur marknasamráðingarnar*
*Mynd Jan Müller*

**og tað fer at stór krøv til føroyskar myndugleikar í samráðingum við bretar. Elttør fer at slóða fyri hesum á fundi í dag við bretska starvsbróðurin Brian Wilson**



ALTJÓÐA OLJUMESSA
*Jan Müller úr Stavanger*

**Fara komandi boringar at vísa, at fundið, sum Amerada Hess oa. gjørdu í fjør, er rakstrarverdugt, kann hetta blíva fyrsta framleiðandi feltið á føroyskum øki. Men eftir øllum at døma liggur tað eisini í bretskum øki,**

Tað er ikki sørt lagnunnar speisemi, tá Eyðun Elttør í dag fer at hitta nýggja bretska starvsbróður sín, Brian Wilson, sum tók við sum olju- og orkumálaráðharri fyri ikki so langari tíð síðani. Teir báðir hittast á altjóða oljumessuni í Stavanger at tosa um framtíðar samstarv tvørtur um undirgrundarmarkið millum londini. Júst sama stað, har Eyðun Elttør fyri nøkrum árum síðani hitti táverandi bretska starvsbróðurin, John Battle, fyri at fáa eina loysn á marknatrætuni.



*Brian Wilson, núverandi bretski oljumálaráðharrin verður við á ONS og skal hann hitta Eyðun Elttør í dag.*
*Mynd Uppstream*

Sostatt snýr tað seg framvegis um markið millum londini, tá teir báðir oljumálaráðharrarnir hittast í dag. Men hesaferð er tað við einum gevandi samstarvi fyri eygað. Tað snýr seg m.a. um at finna skilagóðar skipanir fyri at kunna troyta oljufelt, sum ganga um mark tvs., sum eru bæði tilhoyrandi Føroyar og Bretland um somu tíð. Møguleiki er fyri, at fyrsta føroyska oljufeltið eisini er bretskt. Vísa komandi boringar, at tað er lønandi og útbygging skal fara í gongd, so er nógv at tosa um hjá føroyingum og bretum í felag. Tað er hetta prátið, sum teir báðir oljumálaráðharrarnir so smátt fara at seta hol á, hóast teir enn ikki vita, um oljufundið hjá Amerada Hess í fjør er rakstrarverdugt.

Tá marknaavtalan varð undirskrivað millum Føroyar og Bretland buðu bretskir myndugleikar, sum hava drúgvar royndir á oljuøkinum, at hjálpa føroyingum í spurningum sum eitt nú hesum, hvussu ein skal bera seg at, tá eitt oljufelt liggur báðumegin markið. Bretar og norðmenn hava drúgvar royndir í so máta, eitt nú liggur stóra Friggfeltið á báðum síðum av markinum í Norðsjónum.

Hetta var eisini nakað, sum løgmaður og umboð fyri føroyskar oljumyndugleikar tóku upp undir almennu vitjanini hjá løgmanni í Bretlandi fyri skjótt tveimum árum síðani. Tá hitti hann táverandi bretska oljumálaráðharran Peter Hain, sum lovaði at virka fyri einum góðum samstarvi í eitt nú eini støðu, har oljufelt ganga tvørtur um mark.

Neyvan verður talan um nakran drúgvan fund í Stavanger á hesum sinni. Men hann kann kortini koma at slóða fyri einum nýggjum og týdningarmiklum samstarvi millum londini.

# Føroyskar fyritøkur við á ONS

**Óvissan um føroyska økið við tveimum turrum brunnum er uttan iva orsøkin til, at »einans« 12 føroyskar fyritøkur eru við á altjóða oljumessuni í Stavanger í hesum døgum**



OLJUMESSA
*Jan Müller úr Stavanger*

Síðani áhugi tók seg upp fyri føroysku undirgrundini fyrst í 90-unum, serstakliga eftir at danska stjórnin lat føroyingum rættin til ráevni í undirgrundini, hevur føroyski áhugin fyri at luttaka á altjóða oljumessunum í Stavanger og Aberdeen verið støðugt vaksandi. Hesar oljumessur skiftast millum hesar báðar oljubýirnar annaðhvørt ár. Í ár er tað so Stavanger, sum stendur fyri tørni. Óvissan um hvat goymir seg í føroysku undirgrundini og tær heldur miseydnaðu boringarnar hjá Statoil og BP í fjør hava gjørt, at steðgur líkasum er komin í. Tó so – fundið hjá Amerada Hess heldur framvegis áhuganum uppi, og tí eru tað eisini 12 fyritøkur og feløg, sum verða við á messuni í Stavanger.




*Smátjóðirnar Føroyar og Grønland á altjóða oljumessu í Stavanger, saman við oljurisum sum Noregi*
*Mynd Jan Müller*

Hesi eru:
Atlantic Airways
Kjølbro Heilsøla
Poul Hansen
Skipafelagið
Thor
Tor Shipping
Vága Floghavn
Virkisráðgeving
Beras

Básurin hjá føroysku fyritøkunum liggur sera væl fyri, er nummar 1078 og liggur í J-bygninginum, nærhendis høvuðsinngongdina. Hann er 24 fermetrar og liggur hann við síðuna av stóru básunum hjá eitt nú Statoil og Norsk Hydro.

Higartil hevur Menningarstovan tikið sær av føroysku luttøkuni á slíkum framsýningum. Nú er so ætlanin, at Oljuvinnufelagið undir Vinnuhúsinum skal standa fyri tí í framtíðini. Men av tí at Atlantic Supply Base hevði bílagt sær øki fyri seg varð gjørt av at gera ein felagsbás fyri bæði útgerðarhavnina í Runavík og aðrar føroyskar fyritøkur. Tvs. at Oljuvinnufelagið og Atlantic Supply Base í felag standa fyri básinum.

Í sambandi við ferðing, skipar Flogfelag Føroya fyri beinleiðis flúgvara til og frá Stavanger. Flogið verður til Stavanger 26. august klokkan 17:30 og aftur til Føroyar 30. august klokkan 20:00.

Eyðun Elltør, Herálvur Joensen og Alex Buvik frá Oljumálastýrinum vera á ONS 2002 týsdag 27. og mikudag 28. august.

Mikudagin 28. august, um morgunin fer landsstýrismaðurin at vitja føroyska básin í nakrar tímar.

Annars skal Eyðun Elttør hitta bretska orkumálaráðharran Brian Wilson á básinum hjá Trade Partners 850/32 í høll H 27. august klokkan 17.

Sum skilst fer eisini ein av bólkunum undir FOIB at halda fund á ráðstevnuni.



*Stóru framsýningarhøllirnar í Stavanger*